

# MYNDAKAPPING
## Ársins summarmynd 2001

3-arin skipar saman við Atlantic Airways og Sosialinum fyri stórari myndakapping um at finna ársins summarmynd 2001.

Finn tína bestu summarmynd og lat hana inn í 3-aranum ella send hana við postinum.

Vit fara í komandi mikudags-Sosialum at vísa nakrar av innkomnu myndunum.



Sydrugøta á sumri 2001
Sent hevur:
Petra Arge
Tinghúsvegur 59
Tórshavn



Sent hevur:
Peter J. Eliasen
Selheygsgøta 1
Klaksvík



Á Gibraltar
Sent hevur:
Gunnvá Dam
í Lignesi
Kollafjørður



Eg njóti mítt fyrsta summar í Føroyum
Sent hevur:
Jónleif M. Müller
Miðrás 8
Tórshavn



Burtur í torvi
Sent hevur:
Sverre Kruse
Eiði



Tú ert tann fittasta
Sent hevur:
Rakul Mikkelsen
á Heygnum
Toftir

Í oktober verður avdúkað á framsýning á torginum í SMS, hvør eigur ársins summar-mynd. Eisini fáa nr. 2 og 3 ein vinning.

**1. VINNINGUR:**
Vikuskiftisferð fyri 2 til Keypmannahavn, við hoteluppihaldi frá Atlantic Airways,

**2. VINNINGUR:**
Minolta digitalt myndatól. Dimage 201, virði 4.995,-



**3. VINNINGUR:**
Minolta Autofokus myndatól. 150AF. Ársins kamera.



BARA 1 MYND Í HVØNN BJÁLVA!!

Seinasta freist at lata myndir inn er:
**LEYGARDAGIN 13. OKTOBER**

Kom inn í 3-aran við myndini og hesum lepanum ella send hana við postinum.

Sent hevur, navn:
Bústaður:
Postnr.:
Bygd/býur:
Møg. myndatekstur:

☐ Eg vil fegin hava myndina aftur, og havi tí viðlagt ein frímerktan brævbjálva

Send myndina, hendan lepan og frímerkta brævbjálvan til:
**3-arin, postboks 1057, FO-110 Tórshavn**

ATLANTIC AIRWAYS
Sosialurin
3arin


**ítróttur**

Nr. 180 • mikudagur • 19. september 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Danskur meistari

Golf er ikki tann ítróttin, sum mest er at hoyra til í føroyskum ítróttaheiminum. Tó so. Nakað verður spælt her heima, og eisini eru føroyingar aðra staðni, sum sýna spælinum stóran ans.

Ein av hesum er Bue Jacobsen, sum er sonur Peter A. Jacobsen á Oyrabø í Vági. Bue er dagliga venjari hjá golf-felagnum, Furesø, í Birkerød, og herfyri tók hann lut í DM fyri venjarar.

Bue gjørdi ikki mætari enn at vinna kappingina, og er hann sostatt danskur meistari í golf fyri venjarar.

**-jm**

# Dómararnir fáa einki gjørt

**Formaðurin í dómarafelagnum ásannar, at málsviðgerðin í kappingarnevndini tykist løgin, men sigur seg samstundis einki fáa gjørt**

MÁLSVIÐGERÐ
*Jákup Mørk*

Sum nevnt í týsdagsútgávu okkara, so tykist kappingarnevndin hjá FSF at hava tikið heilt onnur atlit, enn tey sum eru vanlig, tá nevndin herfyri viðgjørdi leikbannini hjá Jóhanni Joensen.

Formaðurin í dómarafelagnum, Erling Eysturoy, heldur eisini, at málið tykist merkisvert, men hinvegin sigur hann seg einki fáa gjørt.

- Eg havi sjálvandi frætt um málið, og eg má siga, at bæði í hesum og í málinum um John Petersen tykist niðurstøðan hjá kappingarnevndini heilt løgin. Eftir tilburðin í Klaksvík í fjør, har linjuverji varð sligin av áskoðara, fingu vit tó greitt at vita, at vit ikki skulu blanda okkum upp í málsviðgerðina á nakran hátt, sigur Erling Eysturoy, sum leggur afturat, at eisini tá vóru røddir frammi um, at tilburðurin als ikki hevði funnið stað.

- Sum so er dómarafelagið bara ein áhugabólkur undir FSF, og hava vit tí onga ávirkan á avgerðirnar, sum har verða tiknar, men eg kann sjálvandi hava eina meining um tingini kortini, sigur hann.



*Formaðurin í dómarafelagnum heldur dómarnar vera óforstáiligar, men sigur samstundis, at dómarafelagið einki fær gjørt við hetta*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Verður tikið upp

Dómarafelagið hevur ikki atkvøðurætt á fundum hjá FSF, men felagið hevur hinvegin rætt at framføra síni sjónarmið á aðalfundinum, og hetta tykist eisini vera ein rættur, sum formaðurin ætlar sær at brúka.

- Báðir dómarnir eru óforstáiligir í mínari verð, og hóast vit einki fáa gjørt her og nú, so er tað avgjørt nakað, sum vit koma at taka upp á innanhýsis fundi, sigur formaðurin, sum heldur ikki útilokar, at hetta kemur til viðgerðar á FSF-aðalfundinum.

Mánakvøldið fingu vit orðið á Niklas á Líðarenda, sum var dómari í dystinum millum HB og NSÍ, men hann hevði tá ikki tikið støðu til, um dómurin skuldi kærast. Aðrar viðmerkingar hevði dómarin ikki.

# Jógvan Martin skal venja NSÍ



*Jógvan Martin Olsen verður venjari hjá NSÍ tey bæði komandi árini*

**Hjálparvenjarin á landsliðnum verður komandi tvey árini høvuðsvenjari í NSÍ**

VENJARI
*Jákup Mørk*

Hetta kappingarárið hevur Petur Mohr verið venjari hjá NSÍ. Í Runavík. Hóast Petur áður hevur verið styttri og longri tíðarskeið í Runavík, so gjørdist steðgurin hjá honum ikki so drúgvur hesaferð. Eftir bert eitt ár, tykjast partarnir nú vera samdir um at steðga samstarvinum.

Nýggjur venjari hjá runavíkingum verður Jógvan Martin Olsen, sum hevur skrivað ein tvey ára sáttmála við NSÍ. Jógvan Martin er annars best kendur fyri leilut sín sum hjálparvenjari hjá landsliðsvenjaranum, Allan Simonsen, seinnu árini.

Tað er tó ikki bert sum hjálparvenjari, at Jógvan Martin hevur fingið tær royndir, sum hann komandi tíðina skal oysa av til runavíkingarnar.

Hóast Jógvan Martin ikki hevur tær heilt nógvu royndirnar sum venjari í bestu føroysku deildini, so er tað ongan hátt ein óroyndur harri, sum komandi árini skal standa við stýrisvølin í Runavík. Einasta skeiðið, hann hevur vant 1. deildarleikarar her heima var í 1996, tá hann tók yvir í B68, eftir at Christian Traneberg annars byrjaði árið sum venjari.

Undan hesum hevði Jógvan Martin verið venjari hjá LÍF, haðani hann millum annað tók Hans Fróða Hansen við sær til B68, og síðani 1994 hevur hann havt ábyrgdina av U-16 landsliðnum, umframt at hann í dag hevur høvuðsábyrgdina av øllum U-landsliðunum hjá FSF.

Hvussu verður við starvinum, sum hjálparvenjari á landsliðnum, tykist ikki vera greitt í løtuni. Jógvan Martin hevur annars røkt hetta síðani 1996, men sum nevnt aðra staðni í blaðnum, so er landsliðsvenjaraspurningurin enn ikki avgreiddur. Hjálparvenjarastarvið er ofta nær tengt at hesum, so hvussu verður við hesum partinum av yrkinum hjá Jógvan Martini tykist óvíst.





## FM í virkisfótbólti 2001

Skipað verður fyri FM kapping í virkisfótbólti í Gundadali leygardagin 6. oktober frá uml. kl. 9 til uml. kl. 18.

Nakrar reglur fyri kappingina

- Spælt verður á hálvum vølli
- 7 leikarar eru á hvørjum liði + 5 skiftisleikarar
- Luttakandi leikarar mugu ikki hava spælt í 1., 2., 3. deild ella í steypakappingini hjá FSF í ár 2001
- Seinasta freist at boða frá luttøku er týsdagin 2. okt.
- Luttøkugjaldið er 600,- kr. fyri hvørt lið
- Møguligur ágóði av kappingini fer til uttanlandsferð hjá B36-pillum 2002
- Fullfíggjaðar kappingarreglur eru at finna á www.b36.fo

Luttakandi lið skulu tekna seg til kappingina við at faxa lepan niðanfyri.

Send til: B36 • FM í Virkisfótbólti 2001 • telefax 31 80 36

Navn á liði/liðum:

Arbeiðsplass:

Kontaktfólk:

Tel: